# Upptakið verður stórt

EDMUND JOENSEN
Løgtings- og fólkatingsmaður



Um fíggjar- og búskaparpolitikkurin ikki gerst meira ábyrgdarfullur, og Misskilta Nationalisman ikki verður slept sum búskaparpolitisk kumpass hjá stórum parti av Løgtinginum, verður galin endi í Føroyum.

Reyðu ávaringarljósini yvir føroyska búskapin eru tendrað. Tað var Búskaparráðið, ið tendraði kontaktina í nýggju frágreiðingini, sum kom út herfyri.

Stóra orsøkin er, at gjógvin millum inntøkur og útreiðslur í almenna húsarhaldinum eftirhondini er vorðin so djúp, at álvarsligur vandi er fyri, at her verður galin endi hjá okkum.

Hyggjuráðini frá Búskaparráðnum eru, at politikarar longu nú skipa so fyri, at inntøkurnar økjast, og at útreiðsluvøksturin verður tálmaður og heldur uppat. Ráðið mælir beinleiðis til, at ein ítøkilig ætlan við málum og tíðarásetingum verður gjørd.

Við øðrum orðum: Her má skil koma á í stundini!

**Inntøkuskerjing má steðga**

Sjálvandi skal man vera varin við ikki at vevja politikk upp í virksemið hjá Búskaparráðnum, ið sjálvandi skal virðast fyri sítt politiska óheftni.

Tó vil eg loyva mær at vísa á, at Sambandsflokkurin í longri tíð hevur havt præsis sama boðskap sum Búskaparráðið.

Aftur og aftur hava vit t. d. víst á, hvussu vandamikið tað er at skera seg frá inntøkum, ið eru alneyðugar fyri vælferðina, og sum koma inn í búskapin, einans tí at Føroyar eru við í Ríkisfelagsskapinum.

Her hugsi eg sjálvandi um ríkisveitingina, sum Skaðalandsstýrið, ið kom til valdið í 1998, skar niður við meira enn 400 milliónum krónum. Henda upphædd skal nú hvørt ár hereftir út til skattgjaldaran sum rokning.

Ikki nóg mikið við hesum. Sama Skaðalandsstýrið og eftirfylgjandi landsstýrir hava í alt ov stóran mun hækkað útreiðslurnar uttan at seta inntøkur í staðin.

Nú standa vit so har, sum Búskaparráðið so væl lýsir fyri okkum: uppi yvir einari svartari gjógv millum inntøkur og útreiðslur. Búskapurin er alt annað enn haldførur, er niðurstøðan frá ráðnum.

**Vil skerja upp aftur meira**

Nú skuldi man so trúð, at fimmoyrað fellur hjá teimum flestu. Serliga hjá teimum, sum sita á Tingi og skulu undir at rætta fíggjar- og búskaparpolitisku kósina.

Men nei.

Fyrr í heyst royndu vit í Sambandsflokkinum á Tingið at fáa prísreguleringingina av ríkisveitingini uppá 125 milliónir fyri 2010 inn aftur. “Nei”, søgdu Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin, tí hetta var at “býta høvdið av allari skomm”, varð sagt.

Hvat hendir so nú, at kalla samstundis, sum Búskaparráðið kemur við sínum sera álvarsligu varskó?

Jú, nú kemur Tjóðveldi við einum uppskoti um at skerja almennu inntøkurnar við allari ríkisveitingi, tað eru 615,5 milliónir yvir fýra ár.

Onki skal setast í staðin. Og onki skal sparast aftur fyri upphæddina, ið skal skerast burtur. Einasta grundgeving hjá Tjóðveldinum fyri uppskotinum er, at ríkisveitingin er donsk.

Hvat dámar tær?

**Álvarsligar avleiðingar**

Øll vita, at uppskotið frá Tjóðveldi letur seg ikki gera – og slettis ikki uttan sera álvarsligar avleiðingar fyri føroyingar:

- Búskaparliga afturgongdin sett meira ferð á spiralin niðureftir
- Arbeiðsloysið hevði vaksið munandi skjótari enn nú
- Trýstið á almennar skipanir og ALS hevði verið øðiligt
- Vælferðin hevði verið sett nógv Harrans ár aftur í tíðina

Veiku bólkarnir í samfelagnum høvdu verið harðast raktir

- Ein nýggj fólkaflyting uttan líka hevði tikið seg upp
- Væl útbúgvin og dugnalig fólk høvdu leitað sær til liviligari støð
- Útbúgvin fólk høvdu neyvan komið heim aftur til Føroya

Slíkar avleiðingar tiga tjóðveldisfólk burtur. Tað tænir ikki teirra sak at siga sannleikan.

**Upptakið verður stórt**

Í grundini eru bæði Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldi líka langt burtur frá tí skilagóða politikkinum, Búskaparráðið mælir til.

Teir báðir fyrru, tí teir vilja ikki økja sjálvsagdar inntøkur. Hin seinni tí hann eisini vil skera stóran part av inntøkunum burtur.

Her er ein syndarligur standur, og upptakið verður stórt.

# Tórshavnar Býráð niðurlagar Kommunuskúlan

PÁLL POULSEN
kommunuskúlalærarari í góð 38 ár

Í longri tíð hava lærarar, næmingar og foreldur kent seg ótrygg við støðuna viðvíkjandi, hvussu verður við 10. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla næsta skúlaár. Ótryggleikin stavar frá tí avgerð, sum býráðið hevur tikið um at flyta allar 10. floksnæmingar í Eysturskúlan, henda avgerð er grundað á eina meirilutatilráðing í einum áliti frá nevnd, sum varð sett at koma við tilráðingum um framtíðar skúlan í høvuðsstaðnum. Tilráðingin segði, at best var um allir 10. floksnæmingar komu at ganga á <u>einum</u> staði við <u>egnari leiðslu</u> og <u>egnum hølum</u>. Ætlanin var at skipa henda depilin í samstarv við nýggja miðnámsdepilin í Marknagili.

Sjálvt um grundarlagið undir tilráðingini nú er burtur, heldur býráðssamgongan fast við avgerðina: Bert at bjóða 10. flokk á Eysturskúlanum, og nú koma eisini onnur argumentir fram, sum als onki hald er í:

*Býráðið sigur: Tað verður ov kostnaðarmikið at umvæla Kommunuskúlan, so 10. flokkur kann hýsast har.*

Allir býráðslimir eiga at minnast til, at Kommunuskúlin er umfataður av einari heildarætlan, sum arbeiðseftirlitið kravdi varð sett í verk.

Heildarætlanin er løgd fram, men síðan er bert hent tað, at tann mest niðurslitni parturin av Kommunuskúlanum er enn meiri slitin. Tá 10. flokkur ikki longur er í Kommunuskúlanum, fara næmingarnir í Skt. Frants Skúla neyvan hagar í framhaldsdeild. At skifta skúla fleiri ferðir gevur ikki nakra meining. Hendir hetta, verða 4 flokkar færri í Tórshavnar Kommunuskúla, t.v.s. at talan verður um 200 næmingar færri. Í ringasta føri kann hetta eisini fáa fleiri foreldur at aftra seg við at senda børn í Kommunuskúlan, og so hava vit ta fullkomnu niðurlaðingina. Býráðið sleppur undan at gera ábøtur og umvælingar fyri fleiri milliónir krónur og kunnu ístaðin ríva skúlan niður og byggja okkurt, sum kann standa sum ein varði yvir sitandi býráðssamgongu.

Tí havi eg hesar spurningar til býráðssamgonguna:

Verða tær alneyðugu umvælingarnar og ábøturnar í Kommunuskúlanum ikki framdar, tá 10. flokkur er fluttur inn í Eysturskúlan?

Hava hinir næmingarnir í skúlanum ikki eisini tørv á, at umvælingarnar verða framdar?

Hava foreldrini ikki krav uppá, at teirra børn ganga í einum skúla, har fysisku karmarnir eru í lagi?

Hevur býráðið útrokningar, sum vísa, at ein 10. floksnæmingur í Eysturskúlanum kostar minni enn ein í Kommunuskúlanum?

Skal alt arbeiði, sum hevur verið lagt í at byggja 10. flokk upp til nakað, sum næmingar, foreldur og lærarar eru nøgd við, bara verða sópað til viks sum óneyðugt, námsfrøðiligt fjas?

Hví eru hvørki foreldur, lærarar ella næmingar hoyrd í hesum málinum?

Er býráðssamgongan misnøgd við leiðslu og lærarar í Kommunuskúlanum?

Hava lærarar og leiðsla í Kommunuskúlanum ikki gjørt teirra skyldur?

Er tað í roynd og veru ikki soleiðis, at Býráðið hevur tikið eina avgerð, og tvíheldur um hesa, sjálvt um fleiri í samgonguni ikki hava nakað veruligt argument fyri hesum?

Hevur býráðið tørv á at vísa sítt vald á ein ella annan hátt?

Hevur býráðið gloymt tey góðu úrslit, sum næmingar í Kommunuskúlanum hava fingið í kanningum og kappingum av ymsum slag?

Hevur býráðið gjørt sær greitt, at myndin av røskum og dugnaligum ungdómi í miðbýnum fer at hvørva, um henda ætlan gerst veruleiki.

Til seinast: Tað er skilagott av býráðnum at halda seg til minnilutatilráðingina og hava tveir 10. floksdeplar í kommununi, meðan bíðað verður eftir tí eina stóra deplinum við egnum bygningum, lærarum og leiðslu.

Varðveitið Tórshavnar Kommunuskúla.

# Aftursvar til Janus Hansen

ANNIKA OLSEN
landsstýriskvinna í innlendismálum



Fyrst vil eg takka Janusi Hansen fyri at reisa nógvar áhugaverdar spurningar í grein síni við atliti at atljóða sáttmálum, sum eru settir í gildi fyri Føroyar. Tað er rætt, sum tað verður víst á, at tað hevur gingið striltið við at implementera ásetingarnar í teimum sáttmálum, sum Føroyar gjøgnum árini hava tikið undir við á náttúruverndarøkinum, m.a. atjóða sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi, RAMSAR sáttmálan og AEWA sáttmálan.

Nakað er tó gjørt m.a. í sambandi við sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi. Føroya Náttúrugripasavn hevur tilevnað frálíku bókina *Føroya Náttúra*, sum í teksti, myndum og á kortum lýsir margfeldið í føroysku náttúruni. Hetta arbeiði hevur beinleiðis við grein 6 í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi at gera. Somuleiðis hevur Náttúrugripasavnið skrásett og kortlagt øll plantu- og djórasløg í náttúruni í ein dátugrunn sambært grein 7 í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi. Harumframt hevur náttúrugripasavnið gjørt reyðlistar, hvørs endamál er at lýsa hótt plantu- og fuglasløg í Føroyum, men hetta arbeiðið gongur tíverri striltið orsakað av vantandi játtan.

Somuleiðis eru á fíggjarlógini fyri 2010 settar 2 mió. kr. av til nýggjar bygningar til Skógrøkt landsins. Arbeiðið á gróðurstøðini og hjá Skógrøkt landsins er nettupp at verja trøð- og plantusløg í Føroyum, umframt at granska, hvørji av hesum sløgum hava góð líkindi at vaksa í Føroyum. Hetta er avgjørt ein týðandi liður í at verja plantu- og viðarvøkstur í føroysku náttúruni. Harumframt skulu karmarnir gerast betri á gróðurstøðini soleiðis, at útbúgvingartilboð til ung verða innan hetta øki.

Í tí stóra heila er hetta tó alt ov lítið, ið mun til, hvat verulig vernd av náttúruni krevur. Vit hava í Føroyum í alt ov mong ár verið upptikin av teirri sjónligu dálkingini í náttúruni, t.e. oljudálking, veðurlagsbroytingum v.m., men tann veruliga hóttanin móti náttúruni er tann dálkingin og hóttanin, ið ikki er so sjónlig. Vit geva okkum ov lítið far um verju av plantu- og djóralívi og jørðildi, men eru í ov stóran mun upptikin av umhvørvisdálkingini ella tí, sum vit kalla teirri sjónligu dálkingini í náttúruni. Tað er í tøkum tíma, at vit broyta hugburð og fyrisita og verja okkara náttúru til tess at fyribyrgja, at alsamt fleiri hótt plantu- og djórasløg doyggja út.

Tann nógv umrødda náttúruverndarlógin hevur verið ávegis í langa tíð, og nú hon loksins varð liðug, hevur verið til hoyringar og skuldi leggjast fyri tingið, varð hon steðgað orsakað av manglandi fígging, sum skyldast døpru fíggjarútlitunum í løtuni. Lógin um náttúruvernd er mett at kosta umleið 2-3 mió árliga í fyrisiting, og hetta er neyðugt at játta til hesa lóg, um hon yvirhøvur skal gera nakra nyttu. Náttúruverndarlógin leggur nettupp upp til vernd av náttúru, plantum, djóralívið og jørðildi, og vil eg raðfesta hesa lóg ovarliga og vónandi fáa undirtøku fyri at leggja hana fyri Løgtingið hóast alt, tó við gildiskomu 1. jan 2011.

**Plantagan og grøn øki**

Í sambandi við frálíka átaki um at hava eitt grønt frílendi í Hoydølum haldi eg, at Janus Hansen hevur misskilt meg eitt sindur. Umframt at umsita náttúruvernd og umhvørvisvernd so umsiti eg eisini málsøkið býarskipan og lendisskipan, og tað var í tí sambandi at talan kom inn á grøn øki og týdningin av hesum. Lógin um býarskipan og byggisamtyktir liggur undir Innlendismálaráðnum, og havi eg sum landsstýriskvinna eisini ábyrgd av, at grøn øki verða raðfest, og tað var í hesum sambandi, at eg tók plantaguna fram sum eitt fyrimyndarliga gott dømi uppá góða býarskipan, har man raðfesti eitt grønt øki, sum hevur fingið alstóran týdning fyri trivnaðin í einum býi. Við vón um gott samstarv og íblástur innan náttúru- og umhvørvisvernd í Føroyum.